## Fleiri druknivanlukkur

Tað kann vera hugaligt at svimja fram við donsku strondini ein góðan summardag, men hagtølini vísa, at tað kann eisini vera vandamikið.

Í fjør druknaðu 18 fólk, sum vóru farin at svimja fram við donsku strondini. Fyri tveimum árum síðani var talið ellivu, og í fjør druknaðu níggju, men fyri fýra árum síðani var eingin druknivanlukka av hesum slagnum. Hagtølini vísa, at tað eru yvirhøvur menn í aldrinum 52 til 85 ár, sum drukna, tá teir fara at svimja fram við strondini.

Tølini umfata bara druknivanlukkur í Danmark, og myndugleikarnir siga, at talið er munandi størri, um vanlukkurnar uttanlands verða taldar við. Nógvir danir ferðast uttanlands um summarið, og á hvørjum ári eru tað fleiri, sum drukna, tá teir fara at svimja.

## Skulu kanna sjófuglin

Landsfelagið hjá norskum oljuvinnufyritøkum hevur nú játtað 700.000 krónur til kanningar, sum skulu skráseta sjófugl.

Náttúrugranskingarstovnurin skal standa fyri skrásetingini, og stovnurin fer serliga at leggja dent á fuglasløg sum skarv, lomviga, lunda og teista á góðum fuglaplássum so sum Røst, Hornøy og á Bjarnoynni. Orsøkin til, at júst hesi fuglasløgini eru vald burturúr, er, at tey eru serliga viðkvom fyri oljudálking.

Leiðslan á náttúrugranskingarstovninum fegnast um, at oljuvinnan vísir so stóran áhuga fyri sjófuglinum. Sambært granskaranum Tycho Anker-Nilsen er tað neyðugt at skráseta, hvussu nógv er til av sjófugli í norskum øki, og hvar hann heldur til. Hetta arbeiðið hevur ligið á láni í mong ár, sigur hann við Bergens Tidende.

## Noreg olju til átta ár

Oljuleiðirnar, sum higartil eru funnar í norskum sjógvi, hava nóg mikið av olju til tey næstu átta árini við verandi framleiðslu. Tað vísir ein meting hjá bretska oljufelagnum BP.

Verður hugt at øllum teimum kendu oljuleiðunum í heiminum, eru útlitini ikki so døpur. Michael D. Smith hjá BP sigur við Dagens Næringsliv, at í teimum keldunum, sum higartil eru funnar kring heimin, er nóg mikið av olju til tey næstu 41 árini, um framleiðslan verður hildin á sama stigi sum nú. Fyri tjúgu árum síðani varð hildið, at nóg mikið var av olju til tey næstu 29 árini, men tey seinastu árini eru fleiri leiðir funnar afturat.

Michael D. Smith væntar ikki, at vit fáa so lágar oljuprísir aftur sum í nítiárunum, og tað kann koma norðmonnum væl við. Norski oljumálaráðharrin, Einar Steensnæs, sigur við Dagens Næringsliv, at høgur oljuprísur økir áhugan fyri Norðsjónum sum oljuleið, og tí væntar hann, at virksemið fer at veksa har. Tað fer so aftur at gagna norska ríkiskassanum, sigur ráðharrin.

## 101 ára gamal í fallskíggja

Tann 101 ára gamli avstraliumaðurin Frank Moody er vorðin ein sonn hetja, eftir at hann í gjár leyp út í fallskíggja í 3.000 metra hædd.

Sambært blaðnum Daily Telegraph segði Frank Moody herfyri, at hann hevði sett sær fyri at gerast tann elsti maðurin, sum hevði lopið út í fallskíggja. Gamla metið átti ein 94 ára gamal norðmaður. Vinfólkini hjá Frank Moody vildu ikki trúgva honum, men tey hildu kortini, at hann skuldi sleppa at royna. Hann slapp tí at fyrireika seg, og í gjár fullførdi hann ætlanina.

Fallskíggjafelagið, sum skipaði fyri lopi hansara, hevði sum vera man boðið myndamonnum og tíðindamonnum at fylgja við tilburðinum. Lendingin var kanska ikki tann besta. Í hvussu er ikki fyri tveir av myndamonnunum, tí Frank Moody rakti teir, tá hann kom niður á jørðina, skrivar Daily Telegraph.

# Flýggja undan drápi og neyðtøkum

**Nú flýggja so nógv fólk úr sudanska landspartinum Darfur, at hjálparfelagsskapirnir klára ikki at hjálpa teimum. Tey vita at siga frá ræðuligum tilburðum**

FLÓTTAFÓLK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Ein dagin komu teir arabisku álopsmenninir til bygdina. Teir vóru vápnaðir. Teir leitaðu eftir øllum kvinnunum og valdu síðani tær vakrastu burturúr. Eg var ein teirra. Fýra av álopsmonnunum tóku meg við sær, og teir næstu tíggju dagarnar neyðtóku teir meg. Hvønn dag verða kvinnur rændar og fluttar út í skógin, har tær verða neyðtiknar. Soleiðis er tað hvønn dag.

Søgan hjá hesari 35 ára gomlu kvinnuni er bara ein av teimum óhugnaligu frásagnunum frá teimum túsundtals flóttafólkunum, sum eru flýdd úr sudanska landspartinum Darfur til grannalandið Tjad. Amnesty International, Human Rights Watch og aðrir mannarættindafelagsskapir hava váttað, at frásagnirnar eru sannar. Sambært Amnesty International hava teir vápnaðu álopsmenninir burturflutt nógvar kvinnur og gentur, sum verða nýttar sum sextrælir.

### Stríð um olju

Altjóða hjálparfelagsskapir royna sum frægast at hjálpa teimum nógvu flóttafólkunum, men hetta er ein vónleys uppgáva. Umleið 93.000 fólk eru í legunum, men roknað verður við, at talið fer upp um 200.000 seinni í ár.

Sudanska stjórnin verður løgd undir at forða hjálparfelagsskapunum, og ST vil eisini vera við, at sudanskir stjórnarhermenn hjálpa teimum vápnaðu arabisku álopsbólkunum. ST og fleiri felagsskapir siga, at stjórnin roynir at reka fólkið í Darfur burtur haðani, tí hon vil hava fatur á oljuni har. Sambært blaðnum Neue Zúrcher Zeitung ætlar sudanska stjórnin at økja landsins oljuframleiðslu 200.000 tunnur um dagin, og blaðið vil eisini vera við, at fleiri útlendsk oljufeløg hava sagt seg vera til reiðar at leita eftir olju í Darfur.

Tí roynir stjórnin við hjálp frá teimum vápnaðu álopsbólkunum at ræða tað svarta fólkið burtur haðani við drápi og neyðtøkum. Enn hevur altjóða samfelagið ikki lagt uppí, men kanadiska stjórnin kunngjørdi í gjár, at hon fer at leggja málið fyri trygdarráðið hjá ST mánadagin. Leiðararnir í ES-londunum skulu eisini umrøða støðuna í Darfur um vikuskiftið.

# Reagan við í amerikanska valstríðnum

**Hóast hann fór til gravar í síðstu viku, er fyrrverandi forsetin við í valstríðnum upp undir forsetavalið í heyst**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein konservativur felagsskapur í USA, sum vil hava amerikanararnar at velja George W. Bush á forsetavalinum í heyst, brúkar nú fyrrverandi forsetan Ronald Reagan í valstríðnum. Reagan fór til gravar í síðstu viku, og familjan sigur, at hon hevur ikki givið felagsskapinum tilsøgn um at nýta fyrrverandi forsetan í valstríðnum.

Í einum sjónvarpsátaki verða Reagan og Bush lýstir sum tveir stórir leiðarar, Reagan í bardaganum ímóti kommunismuni og Bush í bardaganum ímóti yvirgangsmonnum. Í filminum er brotið, tá Reagan var í Berlin, har hann bað Mikhail Gorbatjov bróta Berlin-múrin niður. Síðani sæst Bush standa í leivdunum av World Trade Center, har hann lovaði at hevna álopið.

Talskvinnan hjá Reaganættini, Joanne Drake, sigur við tíðindastovuna AP, at



*Bara eina viku eftir jarðarferðina verður Ronald Reagan brúktur til at hjálpa Bush í forsetavalstríðnum*

tey avvarðandi hjá fyrrverandi forsetanum eru misnøgd við, at hann verður misbrúktur á hendan hátt. Hon sigur, at tey avvarandi høvdu sagt nei, blivu tey spurd, um felagsskapurin kundi brúka gamla forsetan í átakinum fyri Bush.





# Kroystir ES-leiðarar mugu semjast

**Tað snýr seg um trúvirðið hjá samveldinum, nú leiðararnir í ES-londunum hittast til at taka støðu til ta nýggju grundlógina. Tað vánaliga valúrslitið í síðstu viku noyðir teir at semjast**

ES-GRUNDLÓG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Eins og fleiri av hinum leiðarunum fingu hesir tríggir ein frammaná á ES-valinum í síðstu viku. Tað kann noyða teir at finna eina semju nú.*

Leiðararnir í ES-londunum eru valla komnir fyri seg aftan á lúsingin, sum fleiri teirra fingu á valinum til ES-tingið í síðstu viku, fyrr enn tann næsta stóra avbjóðingin stendur fyri framman. Í dag hittast teir til fundar í Bruxelles at taka støðu til ta nýggju grundlógina. Men tað er synd at siga, at teir hava fingið stuðul frá sínum veljarum upp undir fundin. Metlág valluttøka og stór framgongd til flokkar, sum seta spurnartekin við samveldið var tann seinasta heilsanin, sum leiðararnir fingu frá veljarunum upp undir tann avgerandi fundin.

### Greið boð

– Tað politiska trúvirðið hjá samveldinum stendur í váða. Vit mugu finna eina semju um ta evropeisku verkætlanina. Vit mugu vísa, at Evropa virkar, segði írski uttanríkisráðharrin, Brian Cowen, fyrradagin.

Í vikuni hevur hann havt fund við sínar evropeisku starvsbrøður, har teir fyrireikaðu sjálvan toppfundin. Írland hevur formansskapin í ES í løtuni, og írska stjórnin hevur tí høvuðsábyrgdina av, at eitt úrslit kemur burturúr.

Tony Blair, Jacques Chirac, Gerhard Schrøder og fleiri av hinum stjórnar- og ríkisleiðarunum hava greitt fingið at vita frá veljarunum, at fólk hava ikki áhuga í ES, soleiðis sum samveldið virkar nú. So mikið størri eru krøvini um, at leiðararnir nú mugu vísa, at teir kunnu semjast um tey stóru málini.

– Veljararnir hava sagt okkum, at teir vilja hava eitt Evropa, sum arbeiðir fyri teirra áhugamálum, og júst tað er endamálið við teirri nýggju grundlógini, sigur bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw.

### Stórur ivi

Hetta er aðru ferð, at ES-leiðararnir royna at semjast um ta nýggju grundlógina. Í demsember í fjør miseydnaðist tað, tí Spania og Póland sýttu fyri at góðtaka atkvøðureglurnar hjá ráðharraráðnum.

Londini eru heldur ikki samd, nú tey hittast aftur, og í veruleikanum eru fleiri spurningar ósvaraðir. Rætt er tað, at londini eru komin nærri hvør øðrum aftan á samráðingar teir seinastu seks mánaðarnar, men kortini hevur eingin av leiðarunum torað at sagt, at hesaferð verða teir samdir.

Tann stóra mótstøðan ella líkasælan í nógvum av londunum er eisini ein ávaring um, at tað er minni enn so vist, at grundlógin verður sett í gildi, sjálvt um leiðararnir samtykkja hana. Í fleiri londum verður fólkaatkvøða um grundlógina, og tað tykist longu greitt, at uppskotið fer at fella í einstøkum londum.

Serliga í Bretlandi er mótstøðan stór, men danskir politikarar kenna seg heldur ikki vísar í, at uppskotið fær meiriluta, tá fólkaatkvøða verður har. Í Danmark verður hildið, at atkvøða teir bretsku veljararnir nei, fara danir at gera tað sama.

# ES heldur ikki samt um formannin

**Um stutta tíð fer Romano Prodi frá sum formaður í ES-nevndini, men enn er avloysarin ikki funnin. Danski forsætisráðharrin verður nevndur sum eitt evni**

ES-ÓSEMJA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Grundlógin er ikki tann einasti trupulleikin, sum leiðararnir í ES-londunum hava at stríðast við í hesum døgum. ES-nevndin skal hava nýggjan formann eftir italiumannin Romano Prodi, og enn er eingin semja um eftirmannin.

Ta seinastu tíðina hava fleiri nøvn verið havd á lofti í Bruxelles. Eitt skifti tóktist belgiski forsætisráðharrin, Guy Verhofstadt, at hava teir bestu møguleikarnar, men seinni gjørdist greitt, at meiriluti er ikki fyri honum. Ein annar, sum er nevndur, er eysturríkski kanslarin, Wolfgang Schússel, men heldur ikki hann tykist vera líka nógv avhildin allastaðni. Tað sama tykist vera galdandi fyri fyrrverandi finska forsætisráðharran Paavo Lipponen og kommiserarnar Gunter Verheugen og Antonio Vitorino.

### Juncker ella Fogh

Eitt evni, sum helst hevði kunnað fingið meiriluta ímillum tey 25 limalondini, er forsætisráðharrin í Luksenburg, Jean-Claude Juncker. Hann hevur drúgvar royndir í ES-arbeiði, men hann hevur ein trupulleika, sum hann sjálvur hevur fingið sær. Undir valstríðnum herfyri



*Anders Fogh Rasmussen verður nevndur sum møguligur nýggjur formaður í ES-nevndini.*

lovaði hann sínum veljarum, at hann fer ikki av landinum at arbeiða. Ella sagt við øðrum orðum: Hann verður ikki formaður í ES-nevndini.

Men hvat við danska forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen? Sambært donskum eygleiðarum hevði hann havt ein møguleika, men hinvegin ivast teir í, at hann fer at siga fortsætisráðharrasessin frá sær. Summir eygleiðarar í Keypmannahavn vænta, at tað hevði beint fyri stjórnini og hennara møguleikum at vinna næsta val. Sjálvur sigur forsætisráðharrin stutt, at hann er ikki ímillum valevnini. Spurningurin er bara, hvussu tað svarið skal skiljast, skrivaði Jyllandsposturin í gjár.